# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Óhugnaligt rák

So hendi tað aftur og hesaferð í Týsklandi. Ein ungur maður fer alvápnaður inn á ein skúla og drepur frá hond, næmingar og lærarar. Hetta rák hevur nú í nøkur ár eyðkent støðuna í USA, Bretlandi, Týsklandi og Finlandi. Fólk øtast og eru sum vera man djúpt skelkað av hesum ræðuligu hendingum, standa spyrjandi og hava ilt við at skilja, hvat tað er, sum hendir rundan um okkum. Hvat er tað, sum fær ungar menn at gerast frá sær sjálvum og at gera seg inn á skúlafelagar ella inn á smábørn, sum als einki hava gjørt til sakar? Hvat endar hetta við? Hvussu skal samfelagið steðga hesum óhugnaliga og sera vandamikla ráki?

Hesir og mangir aðrir spurningar verða settir, hvørja ferð heimurin hevur upplivað hetta ræðuliga fyribrigdið, ið verður nevnt skúlaskjóting. Hóast eingin megnar at geva eitt svar, ið fult út kann greina orsakirnar til hetta ræðuliga fyribrigdi, so hevur hetta, eftir hvat sálarfrøðingar og mannfrøðingar halda nakað at gera við ávís eyðkenni við ta hópmentan, sum eyðkennir framkomna heimin í dag. Nú má ásannast, at frásagnir um valdsnýtslu og harðskapur hava at kalla allar dagar verið partur av mentan og siðsøgu. Hinvegin er undirhaldsídnaðurin í sera stóran mun eyðkendur av harðskapi. Filmur, internet og teknirøðir – alt eyðkent av ógvusligum og ótamdum harðskapi, og torført kann mangan vera hjá ungum og veikum fólkum at skilja millum fiktión og veruleika. Nógv ung kenna seg einsamøll, happað og uttan fyri felagskapin og hava bert internetið, har tað ikki trýtur við hættisligum vandamiklum tilboðum. Stórir bólkar í samfelagnum eru bergtiknir av vápnum eins og ávís lond hava eina so liberala vápnalóggávu, at nógv er til av vápnum í vanligum heimum. Tað øtlandi bandakríggið við skotbardøgum í Keypmannahavn er ein óhugnaligur partur av hesi mynd av vaksandi vápnanýtslu í nútímans samfelagnum.

Henda støða leggur eina sera stóra ábyrgd á foreldur, dagstovnar og skúlar at ansa væl eftir børnum og ungum. Hetta er lættari sagt enn gjørt, tí strongd, vaksandi krøv á arbeiðsmarknaðinum og fíggjarlig trongstøða eru alt tættir, ið draga skeiva vegin. Foreldur, námsfrøðingar og lærarar eru undir einum støðugt vaksandi trýsti frá øllum síðum. Í eitt nú Danmark eru námsfrøðingar nú so illa løntir, at lívslønin hjá einum ófaklærdum er væl hægri enn lívslønin hjá einum námsfrøðingi. Hetta sigur nakað um samfelagsligu raðfestingarnar við atliti at børnum og ungum.

Tað eru ivaleyst nógvar og mangan torgreiddar orsøkir til hesar ræðuligu sorgarleikir. Hinvegin eru ivaleyst nøkur hyggjuráð, sum kunnu fyribyrgja um ikki allan harðskap so ein part av hesum vaksandi trupulleika. Samfelagið eigur sum heild at raðfesta børn og ung fremri. Byrgjast má fyri happing og dagstovnar, skúlar og avvarandi myndugleikar mugu ansa eftir, at eingin smokkar niður í millum í skipanini. Vit eiga sum heild at ansa sera væl eftir børnum og ungum, soleiðis at tey kenna seg elskað, trygg og vælkomin í heimin.

**Sosialurin**

# Misskilir Maud Wang Hansen við vilja?

BILL JUSTINUSSEN



Í eini áleypandi blaðgrein sigur Maud Wang Hansen, at eg vil hava røktarstarvsfólk at arbeiða ókeypis. Antin hevur boðskapur mín verið sera illa framborin, ella hevur hon lurtað sera illa. Samrøða mín við Rás 2 varð gjørd í sambandi við eitt orðaskifti á Tingi í farnu viku, har eg vísti á, at vit í Føroyum í ov stóran mun hava innrættað okkara samfelag eftir donskum leisti. Og at vit í ov lítlan mun hava hugsað fram føroyskar loysnir í okkara sosialu skipanir. M. a. vísti eg á, at í Onglandi hava hjálparfelagsskapir og sjálvboðin møguleikar fyri – sjálvandi undir vegleiðing og ávísing frá professionellum starvsfólkum - at luttaka í arbeiðnum at ansa børnum, gomlum og óhjálpnum. Eg havi á ongum sinni sagt, at starvsfólk skulu arbeiða ókeypis, og havi heldur ikki hugsað tann tankan.

Men meðan vit umhugsa, hvussu vit í framtíðini halda fast um okkara vælferðartænastur - serliga við atliti at vaksandi talinum av eldri, meðan tey, sum arbeiða, gerast færri - eiga vit ikki at bíða við at hugsa alternativt.

Sjálvboðin hjálp er longu, sum Maud Wang Hansen so væl greiðir frá, ein partur av okkara vælferðarskipan. Tí burdi tað ikki verið ein fremmandur tanki at latið dyrnar upp í almannaverkinum fyri felagsskapum og persónum, sum ynskja at veita eina hjálpandi hond uttan viðurlag. Og í tí sambandi vísti eg á, at tað er ikki fremmant fyri føroyingar at taka sær væl av sínum næstu. At Maud Wang Hansen hevur fingið alt annað burturúr hesum viðmerkingum, harmar meg. Tí málið varð ikki ætlað sum ein ábreiðsla á nakran. Vit vita øll, hvussu almenn starvsfólk innan røktartænastuna alsamt mugu renna skjótari fyri at fáa dagin at hanga saman, og er tað neyvan nakar, sum ikki hámetir teirra avrik. Hinvegin er teirra arbeiðsdagur nú mangan vorðin so strævin, at ein hjálpandi hond frá onkrum uttanífrá hevði komið meiri enn væl við. Bæði fyri starvsfólk og brúkarar. Vónandi vil Maud ikki seta seg upp ímóti slíkum møguleikum.

Og so nýtir Maud sjálvandi møguleikan at leggja eftir politikkarum. Men hon tykist at vera sera illa upplýst. M.a. setir hon fram afturvendandi ábreiðsluna um, at politikkarar ikki sita dagin langan og lurta eftir hvørjum øðrum. Løgtingið er soleiðis skipað, at flokkarnir hava framsøgufólk í mun til tær nevndir, tingfólkini sita í. Fyri at skipa tingarbeiðið skilagott, er vanligt, at framsøgufólkini luttaka í orðaskiftinum, meðan onnur í tingbólkinum ofta luttaka á nevndarfundum ella fyrireika seg til aðrar uppgávur. Tað fer nógv annað virksemi fram í Løgtinginum enn tað, sum Maud Wang Hansen sær í tingvarpinum. Tað vildi ikki verið skilagóð umsiting av einum tingsessi – og av skattaborgarans krónum – um øll løgtingsfólk brúktu alla tíðina at sita og lurta eftir hvørjum øðrum dagin langan. Og so ber nú til at fylgja orðaskiftinum í øllum rúmum í Løgtinginum, umframt at øll orðaskiftir verða goymd og løgd út á netið.

Eisini samanber Maud tingarbeiðið við pedagogstarvið. Eg skilji ikki samanberingina, tí tað ber illa til at samanbera størv. Eitt tingfólk hevur t.d. ongan setanarsáttmála og kann, nær tað skal vera, missa starvið uttan møguleika fyri at kæra avgerðina. Tingmannastarvið verður framt í støðugum almennum ljósi, ikki minst gjøgnum tingvarpið. Tí sleppa eitt nú pedagogar undan. Og hvørjar frynsar og ókeypis tænastur, Maud ákærir tingfólk fyri at móttaka, fari eg vinarliga at biðja Maud um at greiða eitt sindur nærri frá. Tí tað ber ikki til at sleingja um seg við slíkum uppáhaldum, uttan at hava sett seg eitt sindur inn í viðurskiftini.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13:30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.